# Hetta klandrast fólk um í bilinum

**TRYGD** Nógv megna ikki at gjøgnumføra ein biltúr uttan at klandrast. – Hetta kann gera sítt til, at fleiri óhapp verða í ferðsluni, meta norskir serfrøðingar

Snorri Brend

Spanski bilframleiðarin SEAT hevur gjørt eina rættiliga umfatandi kanning millum samanlagt 3000 bilførarar.

Kanningin staðfestir, at 71 prosent av teimum spurdu hava klandrast við sína betru helvt um atburðin í ferðsluni hjá tí, sum situr við róðrið.

Sambært kanningini byrjar klandrið í miðal 22 minuttir eftir at koyritúrurin byrjar.

Støðið í klandrinum er sjálvandi ymiskt. Meiri enn helmingurin av luttakarunum í kanningini svaraðu, at tey hava klandrast so mikið, at tey ikki skiftu eitt einasta orð við hin restina av koyritúrinum.

## Tey eymu punktini

Fyri ein av hvørjum tíggju luttakarum í kanningini, gjørdist úrslitið av klandrinum, at tey valdu at lata seg skilja, skrivar bretska blaðið Daily Mail.

Ein av fimm sigur, at tey settu bilin framvið vegnum, og noktaðu at koyra víðari, fyrrenn partnarin var farin út úr bilinum. Umleið líka so nógv svaraðu, at tey gjørdust so uppøst, at tey valdu heldur at ganga til hús.

Koyrirætningur og parkering eru millum tey eymastu punktini. 44 prosent av klandrunum knýta seg til júst hetta. Ov nógv ferð er ein onnur orsøk.

## Fleiri orsøkir

Ferðslugranskarin, Dagfinn Moe hevur granskað í hesum spurninginum í fleiri ár. Fyrri hann er eingin ivi um, at tað er beinleiðis vandamikið at klandrast við partnaran meðan koyrt verður.

– Líkamikið hvat ein klandrast um, so krevur hetta nógva uppmerksomheit. Og tað broytir eisini ta kensluligu støðuna. Við hesum lækkar dygdin í koyringini, og kann enda við eini vandastøðu, sigur Moe.

Hann hevur onga gransking um, hví ein klandrast í bilinum. Ósemja um val av koyrirutu, ferð, vandafulla koyring, floytan eftir øðrum, eru alt orsøkir til klandur.

– Men tað kunnu eisini vera heilt onnur viðurskifti í gerandisdegnum, sum skapa ógvusligt tjak í bilinum, meðan koyrt verður, slær hann fast.

Kanningin hjá SEAT staðfestir, at hvørki kvinnur ella menn dáma serliga væl, at partnarin blandar seg í koyringina. Slík "ráð" eru orsøk til eitt av fimm klandrum, sigur kanningin.



**SÚRUR TÚRUR**

*Koyrirutan er orsøk til flestar tilburðir av klandri, tá pør fara biltúr, vísir nýggj kanning. Lítil ivi er um, hvat hesi bæði eru ósamd um*

*(Modellmynd)*

**Fakta**

**Hetta klandrast pør um í bilinum:**

- Koyriruta/villast: 44 prosent
- At finna parkeringspláss: 37 prosent
- Koyra ov skjótt: 34 prosent
- Koyra ov nær øðrum bilum: 24 prosent
- Blanda seg í koyringina: 20 prosent
- Val av tónleiki ella útvarpsrás: 20 prosent
  Aggressiv koyring: 17 prosent
- Skera svingini av: 15 prosent
- Ov lítil air-condition: 14 prosent

Kelda: Seat

# 200 mió bilar



**MET**

*Ferðslan er nógv økt í Kina. Samstundis ynskja myndugleikarnir at satsa upp á umhvørvisvinarligar bilar*

**KINA** Talið av bilum á kinesisku vegunum verður tvífalt so stórt í 2020 sum tað er í dag. Um 10 ár verða minst 200 mió bilar í fólkaríka landinum í Fjareystri.

Í fjør vórðu seldir nærum 14 mió bilar í Kina.

Við hesum tali er Kina farið framvið USA, sum áður hevði heimsins størsta bilmarknað.

Í 2009 vóru 72 mió bilar í landinum, sambært myndugleikunum.

Í ár vænta teir, at bilasølan fer upp um 15 mió í ár.

Alt hetta hevur fingið myndugleikarnar at hugsa um og arbeiða fyri umhvørvið.

– Vit mugu gera tað til okkara fremstu raðfesting at menna effektiv brennievni, og at menna akfør sum koyra við alternativari orku, verður sagt úr kinesisku ídnaðar- og kunningarráðstovuni.

snorri@sosialurin.fo